# Fjølmiðlalógin viðgjørd á hægsta stigi

**Høgni Hoydal reisti drúgva málið um fjølmiðlaábyrgdarlóg á fundi við danska forsætisráðharran mánadagin. Varaløgmaður vil sleppa at seta føroyska fjølmiðlalóg í verk, men fyrst mugu løgfrøðislig ivamál millum danir og føroyingar beinast av vegnum**

FJØLMIÐLAR
*Eyðun Klakstein*

Framhaldssøgan um føroysku fjølmiðlalógina hevur ikki fingið ein enda enn. Men nú er okkurt sum bendir á, at føroyingar í næstum kunnu fáa egna lóggávu á økinum.

Tá Anders Fogh Ramussen hevði fund við landsstýrið mánadagin, tók Høgni Hoydal málið um fjølmiðlaábyrgdarlógina upp.

– Eg greiddi forsætisráðharranum frá, at vit vilja gjarna seta okkara egnu lógir fyri fjølmiðlar í gildi, og at vit hava lóggávuna á økinum klára. Hann helt ikki, at tað skuldi verið nøkur forðing fyri hesum, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Høgni Hoydal ætlar sær nú enn einaferð at venda sær til danska løgmálaráðið fyri at fáa løgfrøðisligar forðingar um lóggávumyndugleikan av vegnum.

Hetta skal síðani hava við sær, at Føroyar umsíðir fáa eina dagførda lóg um virksemið hjá fjølmiðlunum.



*Høgni Hoydal ætlar sær nú enn einaferð at venda sær til danska løgmálaráðið fyri at fáa málið um fjølmiðlalógina loyst. Mánadagin reisti hann málið á fundi við danska forsætisráðharran*

## Ótíðarhóskandi lóg

Tað liggur ein drúgv søga aftanfyri føroysku royndina at fáa dagført lóggávuna á fjølmiðlaøkinum. Í løtuni er ein elligomul lóg frá 1938 í gildi fyri Føroyar, og hon er als ikki tíðarhóskandi. Hon er frá eini tíð, tá loftmiðlarnir ikki vóru farnir á flog, og internetið var púra óhugsandi.

Í 1991 fekk Danmark nýggja fjølmiðlaábyrgdarlóg, sum setir karmarnar fyri virksemið hjá teimum mongu sløgunum av fjølmiðlum. Donsku myndugleikarnir spurdu tá, um lógin skuldi setast í gildi fyri Føroyar eisini, men landsstýrið svaraði ikki.

Í 1995 tók landsstýrið málið upp, og eftir ráðføringar við føroyskar fjølmiðlar legði landsstýrið uppskot fyri løgtingið um, at danska lógin skuldi setast í gildi fyri Føroyar, tó við onkrum broytingum.

Løgtingið samtykti uppskotið um ríkislógartilmæli í mai mánaði í 1997. Síðani heitti landsstýrið fleiri ferðir á donsku myndugleikarnar um at fáa málið avgreitt, men ikki fyrr enn í november mánaði í 1999 kom svar úr Danmark.

Boðini frá løgmálaráðnum vóru, at tað vildi ikki seta lógina í gildi við teimum broytingum, sum løgtingið ynskti í lógini.

## Ymsir møguleikar

Svarið úr Danmark gav landsstýrinum tríggjar møguleikar. Ein var at góðtaka donsku lógina, sum hon var, men tað helt landsstýrið kundi fáa óhepnar avleiðingar, tí harvið varð tað góðkent, at danskir myndugleikar ikki vildu ganga samtyktum hjá løgtinginum á møti.

Ein annar møguleiki var at boða frá, at málið var avgreitt úr Føroyum, og harvið lata upp í hendurnar á løgmálaráðnum. Hetta kundi hava við sær togtogan millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Landsstýrið legði tí á annan bógv og vildi sleppa donsku lógini og ístaðin gera føroyska lóg fyri økið.

Hetta arbeiðið hevur tikið tíð og hevur eisini skapt onkrar fløkjur. Løgfrøðisligu tulkingarnar eru ymsar, men danir halda ikki, at føroyingar hava lóggávumyndugleikan á økinum sum er.

Tað hevði eisini við sær, at Høgni Hoydal í fjør noyddist at taka aftur eitt uppskot um fjølmiðlasið, sum hann hevði lagt fyri tingið.

## Upp á hægsta stig

Síðani hevur landsstýrismaðurin verið í sambandi við danska løgmálaráðið fyri at fáa staðfest, at føroyingar kunnu gera lógir á økinum. Men har hava tey umborið seg við, at útskifting hevur verið millum starvsfólkið, og at tey skuldu koma aftur til málið seinni. Enn er einki svar komið.

– Tí gjørdi eg av, at taka hetta lutvíst lítla mál upp á hægsta stig, og tað fer vónandi at hava við sær, at vit kunnu loysa málið í næstum. Tað er umráðandi, at Føroyar fáa eina dagførda fjølmiðlalóg, sum er tilagað til føroysk viðurskifti. Vit kunnu ikki liva við eini ótíðarhóskandi lóg á hesum øki, sigur Høgni Hoydal.

– Vit hava eitt lógaruppskot klárt, og tí er tað í grundini bara tann løgfrøðisliga togtoganin millum landsstýrið og løgmálaráðið sum forðar fyri, at vit kunnu seta lógina í gildi.

Fjølmiðlaábyrgdarlógini skal tryggja, at greiðar reglur eru fyri virksemið hjá fjølmiðlunum. Lógarkarmur skal gerast, og eitt fjølmiðlaráð, sum skal ansa eftir, at góður fjølmiðlasiður er galdandi, skal fáast at virka.

– Tað ræður um at bæði at verja borgarar ímóti fjølmiðlunum og at tryggja, at fjølmiðlarnir kunnu arbeiða óheftir og uttan eftirlit, sigur Høgni Hoydal.

# Barnavernd skal vera kommunal

**Klaksvíkar kommuna mælir eisini frá, at landið tekur yvir barnaverndirnar**

BARNAVERNDIR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Klaksvíkar kommuna mælir nú eisini landinum frá at taka yvir barnaverndirnar, soleiðis sum ætlanin er í einum nýggju uppskoti um barnaforsorg.

– Tað ræður um at hava barnaverndirnar nær borgarunum, og tað kunnu kommunurnar tryggja, heldur Eyðgunn Samuelsen, sum er formaður í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu.

– Kanska kundu vit skipað fyri einum samstarvi millum kommunurnar í Norðoyggjum um barnaverndina. Á tann hátt kundu vit bygt eina umsiting upp, har tað eisini gjørdist pláss fyri fakfólki, sum kundi tikið sær av ymsum sosialum málum í kommununum.

Eyðgunn Samuelsen heldur, at um barnaverndin heldur fram við at vera eitt kommunalt øki, so kunnu kommunurnar kring landið brúka fakfólk á staðnum í hesum arbeiði, og møguleiki kundi eisini verið fyri at fingið ein sálarfrøðing í starv.



*Kanska kundu vit skipað fyri einum samstarvi millum kommunurnar í Norðoyggjum um barnaverndina, ístaðin fyri landið yvirtekur økið, heldur Eyðgunn Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu*



# Ferðavinna og økismenning




*Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, væntar ein spennandi ferðavinnudag í Norðurlandahúsinum*

**Ferðaráð Føroya og Vinnumálastýrið skipa í dag fyri ferðavinnudegi í Norðurlandahúsinum. Dentur verður millum annað lagdur á ferðavinnu sum økismennandi tilfeingi**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Ferðavinnupolitikkur og avleiðingar av eitt nú oljuvirksemi eru tættir, sum tiknir verða upp á ferðavinnudegnum í Norðurlandahúsinum í dag.

Dagurin er skipaður við fyrilestrum og orðaskifti um ymisk mál, sum koma ferðavinnuni við.

Høvuðsyvirskriftin er »Ferðavinna og økismenning«, sum sipar til ferðavinnu á smáplássum. Fyrilestrar um hetta verða hildnir av fólki frá Ferðaráðnum, fuglafrøðingi og umboðum frá økisferðavinnufeløgum í landinum. Umrødd verða evni sum samskipan av ferðavinnu og økismenning og ferðavinna og fuglalív.

Men eisini aðrir tættir verða tiknir upp. Eitt nú fer Maurice Mullay frá Shetland Islands Tourism at halda fyrilestur um oljuvinnu og ferðavinnu.

Júst hesin fyrilestur er áhugaverðdur, heldur Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya. Tí hann verður hildin av manni, sum kennir málið innanífrá.

Maurice Mullay hevur verið við í Hetlendskari ferðavinnu alla tíðina, oljuvinnan hevur verið týðandi í Heltandi, og hann veit at siga føroyingum, hvussu har gekk, og hvat vit kunnu vænta okkum í samband við eina møguliga oljuvinnu her.

Aðrir fyrilestrahaldarar eru úr Danmark og úr Føroyum. Hetta eru fólk, sum dagliga starvast í ferðavinnuni ella á einhvønn hátt hava samband við ferðavinnu.

Onkuntíð hevur verið havt frammi, at í Føroyum manglar skelting og avmerking annars at siga ferðafólki um tað ella tað.

Um júst hetta evnið hevur Tórálvur Weihe, arkitektur, gjørt eina frágreiðing, sum hann fer at siga frá í fyrilestri, hann fer at halda í Norðurlandahúsinum.

Ferðavinnudagurin í Norðurlandahúsinum byrjar klokkan níggju og heldur á til klokkan 17 seinnapartin.

# Stígið á gólv so lættliga

**Fyri áttandu ferð skipar Bygdarfelagið Varðin fyri dansinátt í Hósvík. Í ár verður dansað komandi leygarkvøld. Byrjað verður klokkan 22 og hildið á til tann ljósa morgun**

DANSUR
*Edvard Joensen*

Hósvíkingar hava gjørt sær til fastan tátt at hava dansinátt við føroyskum dansi í Bygdarhúsinum fyrsta ella annað vikuskifti eftir tjúgunda. Í ár verður dansað komandi leygarkvøld.

Hetta at koma saman til dansinátt hevur fingið rættiliga góða undirtøku, og meta fyrireikararnir, at eini 200-300 fólk plaga at vera í dansi hvørja ferð, tiltakið hevur verið.

Fólk koma úr øllum landinum at kalla, tá soleiðis er. Bæði fólk, sum vanliga dansa, eitt nú í dansifeløgum. Men eisini einstaklingar, sum bara hava hug at fara upp á gólv soleiðis av og á, hittast eitt sovorðið kvøld.

Tað verður havt ymiskt á gólvi eina slíka nátt, og sum vera man er kapping um at sleppa framat.

Tó hevur onkuntíð verið fýlst á, at ikki øll tykjast duga at skyna á umstøðurnar. Hava »situatiónsfornemilsi«, sum tað eitur á fremmandum máli. Tí ikki er ókent, at tá onkur byrjar kvæði ella tátt, sum fer væl yvir 100 ørindi, eru ikki so fá, sum hava hug at halda, at tað tekur ov langa tíð, og so aftur ger, at fleiri ikki duga ella tíma at vera uppi í alla tíðina. Tí er ikki óvanligt at hoyra í slíkum førum, at fólk heldur áttu at tikið styttri kvæði ella vísur, sum øll ella flestu duga, og soleiðis eisini latið fleiri sloppið at skipa.

Dansináttin í Bygdarhúsinum í Hósvík kostar 50,- krónur fyri hvønn. Íroknað atgongumerkjaprísin er eisini okkurt til matna út á náttina, sigur Bygdarfelagið Varðin í tíðindaskrivi.



*Dansináttin í Hósvík er vorðin afturvendandi táttur á hvørjum ári. Myndin er frá Landsdansistevnuni, sum var í Havn í fjør*

Mynd: Jens Kristian Vang